# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Stórt ella smátt – bygnaður og innihald

- Smátt er gott, hoyrist ofta her í Føroyum. Vit hava av góðum grundum langa siðvenju við smáum eindum. Við afturvendandi millumbilum kemur upp orðaskifti um teir mongu smáu skúlarnar mótvegis teimum stóru og miðsavnaðu skúlunum. Hesi orðaskifti stinga seg vanliga upp í samband við ætlanir hjá landsmyndugelikum, ið við røttum ella við órøttum kunnu tulkast sum politiskar royndir at fremja grundleggjandi byganaðarbroytingar innan føroyska fólkaskúlan. Fólkaskúlin stendur eins og í okkara grannalondum frammanfyri sera stórum avbjóðingum. Hesar avbjóðingar eru av bygnaðarligum so væl sum av innihaldsligum slagi. Samfelagið broytist skjótt. Vitanarsamfelag, nútímansgerð og altjóðagerð seta alt størri krøv til útbúgvingarverkið og politikkararnir hava torført við at útvega tað fíggjarliga tilfeingi, ið skal til fyri at lúka hesi stóru krøv. Tað er tí við hesum bakstøði í huga vælskiljandi, at viðkomandi myndugleikar og teir politiskt byrgdarhavandi støðugt leita eftir hóskandi fíggjarvánum. Tað er undir hesum umstøðum nærliggjandi at líta at bygnaðinum til tess at vita, hvørjir møguleikar eru fyri størri fullnýtslu ella rationaliseringsmøguleikum, sum hetta nevnast við einum fremmandaheiti. Men farið fram eftir fummum uttan miðvísa ætlan, samstundis sum tað verður mett sum nærum halgibrot at sera spurnaraðartekin við smáu skúlarnar.
Men nú tykist kortini sum ávísur røringur er komin í hetta mál og nýggir tónar ljóða frá pørtum, ið vanliga seta seg upp í móti bygnaðarbroytingum. Í blaðnum í gjár setir kendur skúlaleiðari spurnartekin við tað námsfrøðilga og sosialt skilagóða í at varðveita smáu skúlarnar. Í somu útgávu kemur formaðurin í Føroya Lærarafelag við sera áhugaverdum útspæli, ið leggur upp fyri fyrimunum við stórum so væl sum smáum eindum. Lyklaorðini eru samstarv og samskipan. Myndugleikar ger vanliga tað mistak, at broytingar koma sum snarljós frá heiðum himni. Hetta skyldast sjálvsagt, at broytingarnar, sum t.d. kravið um 26 børn í hvørjum fyrsta flokki, at kalla ongantíð koma ikki av námsfrøðiligum ella skúlafakligum fyrilitum, men av bráðkomnum fíggjarligum trupulleikum. Soleiðis er tað í landi við ongum miðvísum, visjonerum og langsiktaðum útbúgvingarpolitikki. Men hetta kann ikki halda fram soleiðis. Nógv, og ikki minst samrøðurnar í blaðnum í gjár, bendir á, at fylling tíðarinnar er komin. Nú er at smíða, meðan jarnið er heitt og tí skulu politisku myndugleikarnir taka seg um reiggj og fáa skil á alt økið. Vit eiga at hyggja nærri at innihaldi og bygnaði og loysa trupulleikarnar undir einum – dagstovnar og fólkaskúla – lærara- so væl sum pedagogútbúgvingar. Og síðst men ikki minst eiga lærara- og pedagokútbúgvingarnar at skipast á masterstøði. Tað skilagóða arbeiðið, sum ABC samgongan setti í gongd, eigur at gerast liðugt alt fyri eitt! Endurskoðan eigur at verða gjørd við atliti at samanhangi, samstarvi, bygnaði og innihaldi. Hetta snýr seg um børnini, um framtíðina - farið til verka!

**Sosialurin**

## Hygg frameftir, Kári!



**HÁKUN DJURHUUS,**
stjóri í SEV

Líkt er til, at formaðurin í Føroya Náttúruverndarfelag, Kári Thomsen, hevur meira enn ilt við at síggja veruleikan í eyguni og koma úr stað í spurninginum um framtíðar útbyggingar á elorkuøkinum.

Meginparturin av tí, hann leggur fyri dagin í hesum kjaki, eru endurtøkur og aftur endurtøkur. Ja, útslitnar endurtøkur.

Tí loyvdi eg mær í grein í gjár at siga, at tað sær ikki mætari út enn, at FNU hevur fingið SEV um skrúvuna!

Aftursvarið frá Kára Thomsen og FNU í morgun bendir tíverri á, at so er.

Har er sami sjongurin umaftur.

**Aftur í 80-ini**

Sum ikki eina ferð leitar hann aftur í 80-ini og stríðið, ið tá var um, hvørt tað var rætt ella skeivt at fara undir Eiðisverkætlanina og í hvørji hædd, byrgingin skuldi liggja, ið vatnið skuldi leiðast í.

Eg haldi, at tað gevur lítla og onga meining at halda fram við hesum orðaskiftinum, sum í botn og grund endaði fyri útivið 25 árum síðani, tá avgjørt varð at fara undir hesa verkætlan.

Vit mugu líta frameftir, Kári, so kom nú úr stað!

Kann tó skoyta uppí, at Eiði 2, sum nú er í gongd, avgjørt er við til at styrkja um samlaðu verkætlanina.

**Munur á livitíð**

Kári tvíheldur eisini um, at 6 vindmyllur á 660 kW fyri 40 mió. kr. kunnu framleiða somu ravmagnsnøgd sum Eiði 2, ið kostar 200-300 mió. kr. (Rætti kostnaðurin er áleið 250 mió. kr. íroknað triðju turbinuna á Eiðisverkinum).

Her gloymir hann, at livitíðin hjá vatnorkuverkum er minst tríggjar ferðir longri enn hjá vindmyllum, eins og vatnorkan eisini hevur goymslumøguleikar, sum verandi vindmylluútbyggingar ikki hava.

Í royndum sínum at prógva, hvussu skaðiligar vatnbyrgingar eru fyri náttúru og umhvørvi við sínum útlátum av veðurlagsgassum, nevnir Kári Thomsen sum dømi Balbina-byrgingina í Brasilia, sum hann sjálvur sigur er millum tey ringastu dømini í heiminum!

Sakni í hesum sambandi eitt roknistykki frá honum, sum ítøkiliga vísir, hvussu vorðið er á hesum øki her heima hjá okkum sjálvum.

**SEV og alternativar orkukeldur**

Kári Thomsen heldur eisini uppá, at SEV "er sera seint í upptrekkinum", tá ið ræður um alternativar orkukeldur, og tekur sær og FNU heiðurin av, at seks vindmyllur eru komnar upp at standa síðani Orku- og Umhvørvisráðstevnuna í 2002, sum teir tá skipaðu fyri.

Her fer hann eisini skeivur.

SEV setti longu í 1993 upp sína fyrstu vindmyllu í Neshaga, og høvuðsorsøkin til, at so long tíð gekk, áðrenn tær næstu tríggjar komu upp at standa í 2005, var, at trupult var at finna ein veitara, ið kundi levera hóskandi myllur.

Harumframt tók m.a. myndugleikaviðgerðin av umsóknini drúgva tíð.

**Ov lágur prísur**

Kári heldur eisini uppá, at vit um 6 ár – bara við vindi - kunnu framleiða somu nøgd av ravmagni sum Eiði 2 er ætlað at geva (17 mió. kWh pr. ár) fyri 20-25 oyru pr. kilowatt.

Hesin prísurin er alt ov lágt settur!

Kann í hesum sambandi upplýsa, at SEV í dag keypir vindorku fyri 40 oyru pr. kilowatt, og at ein lægri prísur neyvan er hugsandi.

Uppáhaldið um, at SeWave-tøknin ikki hevur vunnið altjóða viðurkenning, er somuleiðis burturvið.

Um so var, hevði ES neyvan stuðlað verkætlanini við góðum 10 mió. kr.!

Avbjóðingin er at finna ein máta at fáa orkuna skynsamt inn á netið og at finna frægasta mátan at fáa orkuna burturúr náttúrukreftunum.

Ætlaða royndarverkið hevur til endamáls at geva eitt íkast til hetta arbeiði.

**SEV steðgar ikki FNU**

Tað er eisini púra burturvið at leggja SEV undir at hava steðgað ætlanini hjá FNU at fremja sokallaðu FP7-umsóknina.

Vit søgdu allatíðina, at vit fóru ikki at stuðla hesi verkætlan fíggjarliga, men harafturímóti vóru tilreiðar at keypa framleiðsluna, ið møguliga spurdist burturúr henni.

Tað undrar meg, at henda verkætlan ikki var meira borðbar enn so, at hon ikki kundi setast í verk uttan við tveimum mánaðarlønum í stuðuli frá SEV!

**Kanna pumpuskipan**

Viðvíkjandi møguligari pumpuskipan í byrgingunum í Vestmanna, kann eg upplýsa, at SEV og Jarðfeingi hava umrøtt í felag at kanna hesi viðurskifti nærri, og ætlandi fyriliggur eitt úrslit seinni í ár.

Kári mælir eisini til, at ávísir brúkarabólkar leggja seg eftir at brúka ravmagn um náttina heldur enn um dagin.

Hesum kann skil vera í, sæð út frá einum tekniskum sjónarhorni. Men samlaða rokningin skal tó framvegis gjaldast.

Kári Thomsen vísir eisini til frágreiðingina hjá Risø-stovninum, sum enn bert fyriliggur í eini fyribilsútgávu.

Her kann eg upplýsa, at SEV hevur latið inn týðandi viðmerkingar til frágreiðingina, og nú verður so bíðað í spenningi eftir úrslitinum.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.
Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.